| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>30. september 2009 | Blað nr.:<br>**8113** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **30. september 2009** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 190/09-202/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria Hammer Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Levi Mørk sum hevur biðið um farloyvi
Elin Lindenskov sum er stødd uttanlands
Rúni Djurhuus sum er staddur uttanlands

**LUTTÓK EISINI:**
Tina Johannesen
Ingibjørg Berg

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**197/09** **2009-1366**

**Levi Mørk hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni M. Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 30. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**198/09** **2008-3983**

**Fíggjarætlanin 2010 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Uppskotið verður borið fíggjarnevndarlimum í dag.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Samtykt at leggja fíggjarætlanina fyri býráðið.

**Býráðið 30. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina fíggjarætlanina í nevndirnar til viðgerðar.

**199/09** **2007-1833**

**Keyp av bygningi til Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúla**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Bygningurin í Dj. í Geil gøtu 5 er lýstur til sølu. Húsini eru bygd í 1981 og eru 535 fermetrar til víddar, og er grundøkið 616 m².

Grannahúsini í Dj. í Geil gøtu 5 er Skansastova, sum Tórshavnar kommuna eigur.

Í skrivi til Tórshavnar kommunu sigur nýggi stjórin á Kvøldskúlanum Jákup Pauli Strøm m.a.:

Verandi støða hjá Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúla er í løtuni um at vera akutt. Skrivstovan skal út úr Musikkskúlanum, Listaskúlin í Kongagøtu er í ringum standi og loysir tað seg, sambært húsaumsitingini, ikki at umvæla húsini. Samstundis er og verður húsið ikki góðkent til undirvísing av brunamyndugleikunum í verandi líki.

Í sambandi við umbyggingina av Gamla Reinsarínum er ein týðandi føroyskur mentanartáttur "at loysa úr lagdi" eisini vorðin heimleysur.

Øll tey nevndu viðurskiftini hava ført til ætlanina um keyp av bygninginum í Dj. í Geil gøtu. Bygningurin er í góðum standi, hevur betongdekk millum hæddirnar, hevur røttu hølishæddina, hevur góð atkomuviðurskifti og P-pláss, liggur centralt í býnum, og hevur eitt høgt nýtslu- eins og framtíðarvirði.

Hugskotið við bygninginum er at skapa eitt livandi hús og umhvørvi har aktivitetur er alt árið, bæði dag og kvøld. Skrivstovan hevur opið alt árið og í tíðarskeiðnum tá vanliga kvøldskúlaundirvísingin ikki er, er ætlanin at hava summarskeið, fyrilestrar, prógvhandanir og onnur tiltøk, eins og verkstøðini kunnu nýtast til skeiðsvirksemi og vitjandi listafólk.

Húsini eru í 2 hæddum sum kundi verið nýtt soleiðis:

Ovara hæddin:
- 1 stórt hølið á góðar 100 m² verður nýtt til undirvísing, fyrilestrar, skeiðsvirksemi, o.o tiltøk (Hetta hølið kann nýtast til nógv ymisk endamál og kann hýsa fleiri undirvísingargreinum)
- Miðrúmið: móttøka og tekøkur – felags økið sum øll kunnu nýta – skapa trivnað
- 1 stórt hølið á uml. 75 m² verður nýtt til skrivstovu + 1 rúm undirvísing.

Niðara hæddin:
- verður ætlandi býtt í 3 og nýtt til verkstøðini (sum krevja nógv pláss til maskinur o.a.)

1. Stein, silvur, horna slíping og tilgerð
2. At loysa úr lagdi
3. Grafiskan verkstað

Í kjallarahæddini eru vátgólv í fleiri hølum og tí vælegnað til endamálið.

Samanumtikið er ætlanin at húsið skal hýsa umsitingini hjá Kvøldskúlanum og aktivitetum í Listaskúlanum í Kongagøtu, eins og tiltakinum "at loysa úr lagdi".

Við hesum húsinum er ein góður møguleiki at loysa akuttu húsatrupulleikarnar hjá Kvøldskúlanum samstundis sum ein miðdepil verður skaptur fyri øllum frítíðarvirkseminum í kommununi. Ein miðdepil sum kemur at vera sjónligur í umhvørvinum og til gagns fyri allar borgarar í framtíðini."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at keypa húsini í Djóna í Geil gøtu 5 til virksemi hjá Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúla, og at selja verandi húsini hjá Listaskúlanum í Kongagøtu.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at bjóða uppá ognina og at seta ognina í Kongagøtu til sølu..

**Fíggjarnevndin 29. august 2007:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 5. september 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Leiðarin á Kvøldskúlanum hevur sent skriv til Tórshavnar kommunu, dagfest 9. juni 2008, í sambandi við ognina "Einars Prent" J. H. Schrøtersgøta 1.

Í skrivinum verður sagt:

"Advokatskrivstovan Heygum og Petersen lýsti herfyri ognina, J. H. Schrøtersgøta 1, til sølu. Hetta eru húsini har Prentsmiðjan hjá Einars Prent áður helt til.

Sum kunnugt hevur Kvøldskúlin akuttan hølistørv og tí setti undirritaði seg í samband við seljaran, við tí endamáli, at kanna møguleikaranar fyri at nýta ognina til Kvøldskúlavirksemi.

Varð síðani og hugdi eftir ognini og tá eg helt møguleikar vóru við bygninginum legði eg málið fyri á fundi okkara millum tann 21. mai. Avrátt varð at fáa umboð fyri húsaumsitingina at kanna- og gera eina lýsing av ognina.

Undirritaði og Jógvan Hans Hansen frá húsaumsitingini vóru og hugdu eftir ognini tann 27. mai og hettar er mín niðurstøða:

**Alment um ognina**

Húsini eru 630 m² í 3 hæddum, t.v.s. uml. 200m², hvør hæddin. Atkomuviðurskiftini eru góð eins og 18 P-pláss hoyra til ognina. Ognin liggur sentralt í býnum, nær stóra p-plássinum á Frúutrøð og Undir Glasheyggi. Næsti granni eru kringvarpshúsini og hetta kann hava týdning fyri framtíðar nýtslumøguleikarnar.

**Nýtsla**

Av tí, at eindirnar eru á 200m² hvør, eru nýtslumøguleikarnir stórir.
Hugsast kann, at ognin verður nýtt soleiðis:
***Kjallarahædd***: (betongólv) a. Silvur/stein/hornverkstaður; b. Grafikk-verkstaður; c. Møbilpolstring
***Miðhædd:*** a. Tøving/loysa úr lagdi/spinnig; b. Foto; c.Tekning d. Felags køkur , e.wc
***Loftshædd:*** a. Vevskúlin; b. skrivstova c.wc

**Fyrimunir:**

- Nýtsla: ognin er stór og kann hýsa øllum aktivitetunum í Listaskúlanum í Kongagøtu umframt teimum aktivitetum, sum í løtuni eru heimleysir t.e. at loysa úr lagdi og skrivstovuni. Samstundis kunnu núverandi leigumál, t.e. vevskúlin og møbilpolstring fáa innivist har eisini.
- Spara leiguútreiðslur
- 3 javnstórar hæddir; stór rúm og høgt millum loft og gólv
- 18 p-pláss
- Plasering mitt í býnum
- Framtíðar nýtsluvirði stórt
- Kongagøta seljast og fáast inn í handilin
- Kvøldskúlin fær frið til fáast við sínar verðuligu uppgávur og til menning
- Pedagogiskt/kreativt umhvørvi er eitt pluss fyri skúlan og býin

**Vansar:**

- Kostnaður: bygningurin skal hava størri umvæling (sí frágreiðing frá Jógvan Hans)

**Niðurstøða:**

Samanumtikið ein spennandi møguleiki sum m.a. inniber:

- *Búskaparliga*: Bygningurin kann keypast til rímuligan prís og sjálvt um ístandsetingin krevur eina munagóða upphædd, er hetta búskaparliga forsvarligt. Við umbyggingini fæst ein bygningur, ið lýkur krøvini, sum Kvøldskúlin setur og nýtsluvirði gerst størri. Verandi leigumál verða inndrigin (uml. 20.000 kr. pr. mánað) og er hetta bert positivt. Listaskúlin í Kongagøtu

skuldi havt stórt søluvirði í løtuni tí hann liggur í miðbýnum og í einum øki, sum ávísur eigari er áhugður í.

Havast skal eisini í huga hvat alternativið er, um ongin bygningur verður fingin til vega. Skrivstovan og "at loysa úr lagdi" skulu hava hølir og hesi kunnu, sum nú er, bert fáast til vega sum leigumál. Samstundis skal havast í huga, at ognin í Kongagøta ikki lýkur mest neyðturviligu bruna- og trygdarkrøv, ið verða sett einum skúla.

- *Trivnaður:* ónøgdin og ótryggleikin sum hevur valda í Kvøldskúlanum í longri tíð kann fáast av vegnum, samstundis sum eitt mennandi skúlaumhvørvið kann skapast.

- *Fysiskt*: við umbyggingini fæst ein góður bygningur, ið lýkur bruna- og trygdarkrøvini og verður samstundis innrættaður soleiðis, at hann hóskar til endamálið.

Samanumtikið er hetta ein møguleiki at geva største og mest fjølbroytta skúla í landinum sømilig kor, soleiðis at hann kann mennast og gerast enn eitt stað sum virkar fyri trivna og framburði í býnum. Skúlin skal vera ein miðdepil, sum savnar stóran part av frítíðarvirkseminum og verður sostatt ein møguleiki afturat at stimbra uppundir trivnaðin og blómandi mentanina í býnum."

**Byggideildin:**
Byggideildin metir, at tað fer at kosta umleið 2,7 mió kr. íroknað 6,5 % mvg og 10 % í ókendum at umbyggja húsini til tørvin hjá Kvøldskúlanum og sambært krøvum til brunaviðurskifti og atkomu hjá rørslutarnaðum.

Víst verður til tilfar frá byggideildini 9. juni 2008.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at keypa bygningin hjá Einars Prent, í J. H. Schrøtersgøtu til virksemi hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og Listaskúla, og at selja verandi bygning hjá Listaskúlanum í Kongagøtu eins og at siga upp verandi leigumál.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um keyp og sølu av omanfyristandandi ognum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at keypa bygningin hjá Einars Prent, í J. H. Schrøtersgøtu til virksemi hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og Listaskúla, at játta neyðugan pening at umbyggja húsini

til endamálið, og at selja verandi bygning hjá Listaskúlanum í Kongagøtu eins og at siga upp verandi leigumál.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast víðari um keypi.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Samtykt at leggja nýtt boð inn fyri Einars Prent, og boða seljaranum frá hesum. Kunnað verður aftur til fíggjarnevndarlimirnar um eventuelt keyp.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa bygningin hjá Einars Prent, í J. H. Schrøtersgøtu til virksemi hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og Listaskúla, fyri 6,5 mió. kr. og at játta 2 mió. kr. til neyðugar umbyggingar at umbyggja húsini til endamálið, og at selja verandi bygning hjá Listaskúlanum í Kongagøtu eins og at siga upp verandi leigumál, at fíggja av konto 90 – konto fyri íløgur.

**Býráðið fyri læstum hurðum 29. januar 2009:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen, um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti 29. januar 2009 at keypa bygningin hjá Einars Prent í J. H. Schrøtersgøtu til virksemi hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og Listaskúla. Samtykt varð eisini at játta 2 mió. kr. til neyðugar umbyggingar at umbyggja húsini til endamálið

Byggi- og býarskipanardeildin hevur gjørt útbjóðingartilfar og innheintað undirhondsboð upp á umbyggingararbeiðið frá tveimum byggifyritøkum. Tilboðini komu inn 13. august 2009. Tey vóru:

| | |
|---|---|
| Húsavarðartænastan | kr. 3.639.240,00 uttan mvg |
| ÁTS | kr. 3.996.542,01 uttan mvg |

Lægra tilboðið var frá Húsavarðartænastuni. Við øllum íroknað kom heildarprísurin at vera áljóðandi 5 mió. kr. íroknað 6,25% í MVG, 5% í eftirliti og 10% í ókendum kostnaði.

Mentamáladeildin hevur saman við byggi- og býarskipanardeildini og leiðslu skúlans gjøgnumgingið tilboðið frá Húsavarðartænastuni við tí fyri eyga at halda arbeiðið innan fyri fíggjarkarmin. Mælt verður til at gera loftshæddina og miðhæddina lidna og at bíða við kjallarahæddini.

Arbeiðið kostar kr. 2.930.000. Kvøldskúlin klárar av rakstrinum sjálvur at fíggja kr. 930.000,- til umbyggingina. Gjølligari útgreinan verður givin á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lækkaða tilboðnum frá Húsavarðartænastuni á kr. 2.930.000 og játta 2 mió. kr. av kontu 90 til íløgur í 2009.

**Mentamálanevndin 23. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við lækkaða tilboðnum frá Húsavarðartænastuni á kr. 2.930.000.

**Býráðið 30. september 2009:** Einmælt **s**amtykt.

**200/09** **<u>2009-2308</u>**

**<u>Badmintonhøllin – umvæling av tekju</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at Badmintonhøllin er yvirtikin av Tórshavnar kommunu, verður arbeitt við at gera stórar ábøtur á hana. Fyrsta arbeiðið, ið verður gjørt, er at steðgað lekunum í tekjuni. Hetta verður gjørt við at skifta hana út.

Ráðgevi hevur gjørt útbjóðingartilfar og innheintað tvinni undirhondsboð, tey eru hesi:

| | |
|---|---|
| Takplan | kr. 2.172.175,00 uttan mvg |
| Inntakt | kr. 1.324.965,00 uttan mvg |

| | |
|---|---|
| Undirhondsboð frá Inntakt | kr 1.324.965,00 |
| Óvæntað 10 % | kr 132.500,00 |
| Útreiðslur fyri útbjóðingartilfar | kr. 75.000,00 |
| Eftirlit | kr. 70.000,00 |
| Mvg 6,25 % | kr. 95.466,56 |

Samlaðar útreiðslur kr. 1.697.931,63

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til, at tikið verður av undirhondstilboðnum frá Inntakt og arbeiðið verður sett í gongd. Eisini verður mælt til, at kr. 1.697.000 verða játtaðar av kontu fyri íløgur til endamálið

**Mentamálanevndin 23. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. september 2009:** Einmælt samtykt.

**201/09** **2002-2686**

**Umsókn um øki til Dansifrøi og stuðul til bygging**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um øki og loyvi til felagsbygging til 2 felags høli til Dansifrøi og Fimleikafelagið Ljósið.

Feløgini vísa á øki í Gundadali, ið er ogn hjá TK, og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j.nr. 200202686-2
Tekningar av skitsuprojekti: j.nr. 200202686-2
Kortskjal av økinum: j.nr. 200202686-3

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Dansifrøi hevur fyrr havt samband við umsitingina, har teir hava søkt um at fáa útvega økið, men hava ikki víst á nakað, sum umsitingin hevur mett verða gongd leið.

Umsitingin hevur havt samráðingar við fimleikafelagið í sambandi við, at teir upprunaliga søktu um einhvørja høll, av tí at teir høvdu stóran hølistørv. Í hesum sambandi vísti umsitingin tá á, at teir arbeiddu við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki, nú saman við Dansifrøi.

Arkitekturin hevur verið á byggideildini og framlagt verkætlanina fyri býararkitektinum og hevur fingið at vita, at ymisk viðurskiftir uttanfyri, so sum parkering og ferðsla í sambandi við verkætlanina skulu endaliga viðgerast í samráð við umsitingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata umsøkjaranum økið at byggja verkætlanina á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður umsøkjaranum, at skipa soleiðis fyri, at parkering og onnur uttanumviðurskifti verða gjørd í samráð við umsitingina hjá TK.

Endaliga verður gjørt vart við, at endalig umsókn um byggiloyvi skal leggjast fyri nevndina aftur, tá ið allar tekningar og neyðug loyvi fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2003:** Mikael Viderø, býararkitektur, kunnaði nevndina um felagsbygningin hjá Dansifrøi og Fimleikafelagnum Ljósinum.

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 29. september 2003 treytað av, at ungdómsdansur verður ein partur av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskip-anarnevndini og at taka upp samráðingar um økið.

**Ískoyti:**
Broyting er hend soleiðis, at fimleikafelagið Ljósið er farið úr verkætlanini. Felagið Dansifrøi er komið við broyttari verkætlan.

Nýggjar tekningar eru komnar frá Arkitektavirkinum Magnus Hansen.

Gólvvíddin er 840 $m^2$.

Mesta hædd á bygningi 9,5 m.

Tal av bilstøðlum 40, kravt tal av bilstøðlum 1 stk/50 $m^2$.

Av tí at enn ikki er avgjørt um grundøkið skal frámatrikulerast, ber ikki til at rokna byggistig ella nettonýtslustig.

Bygningurin liggur í økispartinum D2 ítróttarøki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at broytta verkætlanin verður góðkend, og at umsóknin um byggiloyvi verður gingin á møti. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin viðger nýggju fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at góðkenna broyttu verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Samstundis verður spurningurin um tær nýggju fíggjarligu fyritreytirnar beindur í viðkomandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur, tá mentamálanevndin hevur viðgjørt málið.

**Nýggj umsókn um stuðul**.

**Á fundi í mentamálanevndini 10. februar 2004** samtykti nevndin at játta 30% av kr. 16.500.000,00, sum býráðið á fundi 19. februar 2004 samtykti at taka undir við mentamálanevndini, sum sostatt fellur burtur nú nýggj umsókn er komin.

- Í nýggju umsóknini, dagfest 11. juli 2005, er kostnaðarmetingin kr. 7.600.000,00 tilsamans uttan MVG ella kr. 9.500.000,00 við MVG, og søkir Dansifrøi um øktan stuðul frá teimum 30% til 60% fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki beinanvegin.

Við 30% kr. 2.850.000,00 og 60% kr. 5.700.000,00.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta 60% av kr. 9.500.000,00 svarandi til kr. 5.700.000,00 í stuðli av konto 64, og at leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevdina, til góðkenningar.

Eisini samtykt at heita á umsitingina um at gera avtalu um nýtslurætt til hølini til m.a. ungdómsdans og leggja avtaluna fyri nevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Málið var umrøtt og samtykt í prinsippinum at taka undir við mentamálanevndini at veita 60% í stuðli, nú landið ikki stuðlar, við nærri treytum og at leggja málið fyri á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at stuðla hallarbyggingina við 5,7 mió. kr. yvir 5 ár við trygd í ognini og avtalu um nýtslurætt og at leggja málið fyri mentamálanevndina og býráðið.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við uppskotinum um avtalu millum Tórshavnar kommunu og Dansifrøi um nýtslurætt til felagshúsið, j. nr. 2002-2686.

**Ískoyti:**
Í sambandi við býarskipanararbeiðið, sum fer fram av økinum í og kring Gundadal, vísandi til nógvu verkætlanirnar, sum bæði kommunan og felagsskapir hava staðsett í økinum, hevur umsitingin mett um staðsetingina av bygninginum hjá Dansifrøi.

Tá nevndin seinast viðgjørdi málið, í samband við prinsipiella tilsøgn um byggiloyvi, vóru munandi øðrvísi fortreytir at leggja til grund fyri støðutakanini til staðseting í mun til aðrar byggingar í økinum. Her er tað serstakliga núverandi verkætlanin hjá grunninum Tórsvølli sum hevur við sær, at tað ikki kann metast ráðiligt at staðseta bygningina hjá Dansifrøi har sum upprunaliga skotið upp. Tættleikin millum báðar verkætlanirnar má metast at vera ov stórur, og kemur at treingja óneyðugt samanum.

Vísandi til at Tórshavnar kommuna eisini fer undir eina víðkan av høllini á Hálsi og atlitið til at Gundadalshøllin hevur framíhjárætt til lendi at víðka móti ætlaðu staðsetingini til Dansifrøi, má metast at økið fer at gerast ov trongt.

Umsitingin hevur tískil víst á aðra staðseting til bygningina hjá Dansifrøi. Sí kortskjal dagfest. 22.02.2007.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta bygningina hjá Dansifrøi sambært kortskjali dagfest. 22.02.2007, vísandi til at hetta er sera hóskandi øki, har verkætlanin vil kunna stuðla væl undir virkseminum og parkeringviðurskiftunum í sambandi við høllina á Hálsi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 22. februar 2007:** Málið útsett.

**Uppískoyti:**
Skriv er komið frá felagnum, har teir vísa at teir eru glaðir fyri staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 2. apríl 2007:** Ein meiriluti Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen og Leivur Hansen mælir til at halda fast við upprunaligu staðsetingini av felagshúsi og varðveita geiran millum Ítróttarhøllina og R.C.Effersøesgøtu sum eitt grønt øki.

Harumframt samtykti nevndin at leggja avgerðina fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Katrin Dahl Jakobsen, um at beina málið aftur í byggi og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, og Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen.

**Ískoyti:**
Dansifrøi hevur fingið byggiloyvi, dagfest 13. 12. 2007, journal nr. 2007-3092/44, og var arbeiðið byrjað. Tá bygningurin var liðugt stoyptur var staðfest, at bygt var ikki sambært byggiloyvinum, tí innrættingin var speglvend.

Arbeiðið var steðgað, og umsøkjarin er nú komin við nýggjari umsókn, sum er í samsvari við byggiloyvið, men nakað broytt. Tí er málið viðgjørt av nýggjum, og sent til teknisku deild hjá TK, og til Brunaumsjón Landsins.

**Viðmerkingar:**
Notat frá teknu deild liggur í málinum (j.nr. 2007-3092/48).

Samanumtikið er tekningstilfarið ikki egnað til viðgerð hjá teknisku fyrisitingini.
Tá greiðar, mátsettar tekningar, eisini í mun til matrikulmark og grannabygningar og herundir Tórsvøll, fyriliggja, ynskir tekniska fyrisitingin at viðgerða hesar.

Viðmerkingar frá Brunaumsjón Landsins eru ikki komnar.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar frá teknisku deild, og málsgongdina annars í málinum, har umsitingin í fleiri umførum hevur havt fund við umsøkjaran um loysn í málinum, og har umsitingin nágreiniliga hevur útgreinað krøv til, og umbiðið sær nøktandi tekningstilfar, mælir býararkitekturin til at nevndin heitir á umsøkjaran um at leita sær nøktandi ráðgeving og at venda aftur við nøktandi tekningstilfar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. oktober 2008:** Nevndin samtykti at ganga tí nýggju umsóknini á møti við treytum sum umsitingin setur.

**Ískoyti:**
Byggiloyvi er útskrivað 28. november 2008, í byggiloyvinum stendur m.a., at áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu, skulu parkeringspláss verða gjørd við Gundadalshøllina, samsvarandi við støðumynd, dagfest 08.07.2005, seinast broytt 24.10.08, j.nr. 2007-3092/55.

Dansifrøi hava sent kommununi eitt skriv, dagfest 4. august 2009, har teir vísa til ein fund sama dag. Í skrivinum boða teir kommununi frá, at felagið ikki er ført fyri fíggjarliga at luttaka í arbeiðinum at gera parkeringspláss, og at hesin kostnaðurin ikki er tikin við í byggiætlanina.

Dansifrøi søkja um:
- at omanfyri nevnda orðing í byggiloyvinum verður strikað og
- at kommunan átekur sær at gjøgnumføra arbeiðið viðvíkjandi parkeringsplássinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta treytirnar í byggiloyvinum og vísa samstundis á, at peningur ikki er avsettur til arbeiðið hvørki av rakstri ella íløgum til at kommunan kann átaka sær at gera arbeiðið og rinda fyri hetta.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Halla Samuelsen og Levi Mørk taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jógvan Arge mælir til at málið verður beint í fíggjarnevndina at taka støðu til um kommunan skal átaka sær at gjøgnumføra arbeiði viðvíkjandi parkeringsplássinum við Gundadalshøllina.

Ein annar minniluti: Jan Christiansen mælir til at treytirnar um parkeringspláss verður strikað, vísandi til at nógv parkeringspláss eru í umhvørvinum og tí at fleiri aðrir bygningar eru gjørdir á staðnum uttan at parkeringspláss eru útvegað.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býararverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstarardeildini mæla til at áleggja umsøkjaranum at lúka treytirnar í byggiloyvinum um parkeringspláss, ella at fylgja upprunaligu umsóknini/projektinum, og at parkeringsøkið verður gjørt liðugt, áðrenn byggivaldið gevur umøkjaranum nýtsluloyvi.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at umsitingin lýsir málið nærri.

**Ískoyti:**
Hjálagt frágreiðing frá Dansifrøi viðv. parkeringsplássunum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen mælir býráðnum til at átaka sær at gjøgnumføra arbeiðið viðv. parkeringsplássinum norðan fyri Gundadalshøllina í sambandi við heildarætlanina fyri Gundadal viðv. ferðslu- og parkeringsviðurskiftum.

Ein minniluti: Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal vísa til samtyktirnar í byggi- og býarskipanarnevndina 31. august 2009 og í teknisku nevnd 3. september 2009.

**Býráðið 30. september 2009:**
Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti.
Atkvøddu fyri Heðin Mortensen, Bogi Andreassen, Jógvan Arge, Jákup S. Simonsen, Maria H. Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen, Sjúrður Olsen. Greiddu ikki atkvøðu Marin K. Frýdal Halla Samuelsen.

**202/09** **<u>2005-0855</u>**

**<u>Broyting í “Reglugerð fyri Tórshavnar Musikkskúla”</u>**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Núverandi reglugerð fyri Tórshavnar Musikkskúla.

§ 1

Tórshavnar Musikkskúli er ein kommunalur stovnur, ið verður stjórnaður av eini 5-mannanevnd. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.

Nevndin velur sjálv formann og setir sjálv starvsskipan sína.

§ 2

Endamálið hjá stovninum er at vekja ans fyri tónalistini og kærleika til hennara, at menna musikalsku gávur næminganna og aðramáta at leggja støði undir einum tíkum musikklívi eitt nú við at íðka samanspæl og samansangi og við at reika fyri konsertum, alment og framíhjá. Setrið hjá stovninum er Tórshavn, yrkisøkið hansara Tórshavnar kommuna.
Yrki skúlans fer fram í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir.

§ 3

Tað er at nevna, at musikkskúlin veitir grundútbúgving, vokal- og/ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samanspæli og samansangi, kunnleika um menturnararvin og um nýggjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin eins og hann skipar fyri næmingaframførslum.

Undirvísingin verður annars at fremja í samsvar við av Landsskúlaráðnum sambært § 2, stykki 3 í løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar ásettar reglur, og kann enda við roynd.

§ 4

Undirvísingar- og mentamálastýrið setir lærarar eftir tilmæli frá nevndini fyri musikkskúlan.

§ 5

Tórshavnar býráð setir eftir tilmæli frá nevnd musikkskúlans ein leiðara at hava dagligu leiðsluna av skúlanum og umsita ognir musikkskúlans. Leiðarin er undir fyristíling av nevnd skúlans og hevur ta dagligu pedagogisku og umsitingarligu ábyrgdini við arbeiði musikkskúlans. Býráðið ásetir løn leiðarans. Hann er við á fundi í nevndini og fremur avgerðir hennara.

§ 6

Musikkskúlin ger á hvørjum ári uppskot til fíggjarætlan skúlans komandi fíggjarár.

Áðrenn 1. februar skal tó nevndin saman við leiðaranum hava kannað undirvísingartørvin og gjørt fyribils uppskot um undirvísingar- og fíggjarætlan.

§ 7

Tórshavnar býráð hevur ta fíggjarligu ábyrgdina av musikkskúlanum.

§ 8

Verður skoytt upp í hesa reglugerð ella verður hon broytt, verður nevndin at samtykkja og býráðið at staðfesta slík uppískoyti ella slíkar broytingar. Henda reglugerð skal vera til skjals fyri teimum, ið hava áhuga fyri henni.

Soleiðis samtykt at Musikkskúlanevnd Tórshavnar býráð 15. februar 2000.

**Uppskot um nýggja reglugerð fyri Tórshavnar Musikkskúla.**

§ 1.

Tórshavnar Musikkskúli er ein kommunalur stovnur undir Musikkskúlaskipanini, sum bjóðar tónleikaundirvísing til børn og ung.

§ 2.

Endamálið hjá Tórshavnar Musikkskúla er at menna musikalsku gávur næminganna, at vekja ans fyri tónleiki, at leggja støði undir einum ríkum musikklívi og skipa fyri konsertum.

Yrki skúlans fer fram í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir.

§ 3.

Tórshavnar Musikkskúli veitir grundútbúgving, vokal- og/ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samanspæli og samansangi, kunnleika um mentanararv og um nýggjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin eins og hann skipar fyri næmingaframførslum.

Undirvísingin verður annars at fremja í samsvar við § 2, stykki 3 í løgingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, um stuðul til musikkskúlar ásettar reglur og kann enda við roynd.

§ 4.

Mentamálaráðið setir lærarar eftir tilmæli frá leiðaranum í Tórshavnar Musikkskúla.

§ 5.

Tórshavnar býráð setur eftir tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum ein leiðara at hava dagligu leiðsluna av skúlanum og umsita ognir skúlans. Leiðarin hevur ta dagligu námsfrøðiligu og umsitingarligu ábyrgdina av arbeiði skúlans. Býráðið ásetur løn leiðarans.

§ 6.

Tórshavnar Musikkskúli ger á hvørjum ári uppskot til fíggjarætlan skúlans fyri komandi fíggjarár.

§ 7.

Tórshavnar býráð hevur fíggjarligu ábyrgdina av musikkskúlanum.

§ 8.

Ein 5 mannanevnd verður sett at fremja áhugamál Tórshavnar Musikkskúla. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið.

Nevndin skipar seg sjálv.

§ 9.

Nevndin arbeiðir fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki, tekur saman við skúlanum stig til næmingaframførslur og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

**Frágreiðing:**
Reglugerðin fyri Tórshavnar Musikkskúla er ótíðarhóskandi, tí broytingar eru farnar fram í musikkskúlaskipanini seinastu árini, men reglugerðin er ikki lagað til hesar broytingar.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til nýggja reglugerð, so hon samsvarar við tær broytingar, sum eru farnar fram.

Leiðarin í Tórshavnar Musikkskúla hevur í dag sama samskifti við kommununa sum aðrir leiðarar viðvíkjandi fíggjarætlan og fíggjarviðurskiftum sum heild.

Sambært broytingunum í reglugerðini verður staðfest, at tað sama er galdandi fyri leiðaran í Musikkskúlanum viðvíkjandi tí fíggjarliga sum fyri aðrar leiðarar. Leiðarin fær ávirkan á lærarasetanir í skúlanum. Uppgávan hjá nevndini verður í størri mun at taka sær av áhuganum fyri tí tónlistarliga, men hon skal ikki taka sær av starvsfólkaviðurskiftum.

Sambært galdandi reglugerð skulu broytingar leggjast fyri musikkskúlanevndina at samtykkja.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at reglugerðin fyri Tórshavnar Musikkskúla verður broytt, soleiðis at hon samsvarar betur við dagliga virksemið

og arbeiðsgongdina, tá ið um fyrisiting, fígging, nevnd o.a. ræður. Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at góðkenna uppskotið av nýggju reglugerðini, og leggja málið fyri nevndina hjá Tórshavnar Musikkskúla at samtykkja, og býráðið at staðfesta.

**Mentamálanevndin 13. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Broytingarnar í reglugerðini eru lagdar fyri musikkskúlanevndina. Nevndin tekur undir við broytingum, men hevur nakrar viðmerkingar og í samráð við nevndina hevur mentamáladeildin gjørt hesar broytingar:

§ 8.
Ein 5 mannanevnd verður sett at fremja áhugamál Tórshavnar Musikkskúla. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið.

Nevndin skipar seg sjálv.

broytt til:

§ 8.
*Ein 5 mannanevnd verður sett at fremja áhugamál Tórshavnar Musikkskúla. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar Býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.*

*Nevndin skipar seg sjálv. Leiðarin í Tórshavnar Musikkskúla er skrivari hjá nevndini.*

§ 9.
Nevndin arbeiðir fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki, tekur saman við skúlanum stig til næmingaframførslur og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív

broytt til:

§ 9.
*Nevndin arbeiðir fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.*

§§ 10 og 11 eru lagdar aftrat

§ 10
*Nevndin hevur í minsta lagi seks fundir um árið, og umboð fyri lærararáðið í musikkskúlanum kunnu luttaka í fýra av teimum.*

§ 11
*Nevndin letur mentamáladeildini ársfrágreiðing í januar.*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna broytingarnar í uppskotinum til nýggju reglugerðina.

**Mentamálanevndin 23. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til staðfestan.

Nýggja reglugerðin at staðfesta hjá býráðnum:

**Uppskot um nýggja reglugerð fyri Tórshavnar Musikkskúla.**

§ 1.
Tórshavnar Musikkskúli er ein kommunalur stovnur undir Musikkskúlaskipanini, sum bjóðar tónleikaundirvísing til børn og ung.

§ 2.
Endamálið hjá Tórshavnar Musikkskúla er at menna musikalsku gávur næminganna, at vekja ans fyri tónleiki, at leggja støði undir einum ríkum musikklívi og skipa fyri konsertum.

Yrki skúlans fer fram í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir.

§ 3.
Tórshavnar Musikkskúli veitir grundútbúgving, vokal- og/ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samanspæli og samansangi, kunnleika um mentanararv og um nýggjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin eins og hann skipar fyri næmingaframførslum.

Undirvísingin verður annars at fremja í samsvar við § 2, stykki 3 í løgingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, um stuðul til musikkskúlar ásettar reglur og kann enda við roynd.

§ 4.
Mentamálaráðið setur lærarar eftir tilmæli frá leiðaranum í Tórshavnar Musikkskúla.

§ 5.
Tórshavnar býráð setur eftir tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum ein leiðara at hava dagligu leiðsluna av skúlanum og umsita ognir skúlans. Leiðarin hevur ta dagligu námsfrøðiligu og umsitingarligu ábyrgdina av arbeiði skúlans. Býráðið ásetur løn leiðarans.

§ 6.
Tórshavnar Musikkskúli ger á hvørjum ári uppskot til fíggjarætlan skúlans fyri komandi fíggjarár.

§ 7.

Tórshavnar Býráð hevur fíggjarligu ábyrgdina av musikkskúlanum.

§ 8.

Ein 5 mannanevnd verður sett at fremja áhugamál Tórshavnar Musikkskúla. Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar Býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.
Nevndin skipar seg sjálv. Leiðarin í Tórshavnar Musikkskúla er skrivari hjá nevndini.

§ 9.

Nevndin arbeiðir fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

§ 10

Nevndin hevur í minsta lagi seks fundir um árið, og umboð fyri lærararáðið í musikkskúlanum kunnu luttaka í fýra av teimum.

§ 11

Nevndin letur mentamáladeildini ársfrágreiðing í januar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna broytingarnar í uppskotinum til nýggju reglugerðina.

**Mentamálanevndin 23. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til staðfestan.

**Býráðið 30. september 2009:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 18.45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |